

# Skipsinspektørur til Strandfaraskip Landsins

Ert tú neyvur og álítandi? Hevur tú fokus á útreiðslur, trygd og umhvørvi? Trívist tú við at hava nógv at gera?

Strandfaraskip Landsins sóknast eftir einum skipsinspektøri at byrja sum skjótast. Tú kemur at arbeiða á rakstrardeildini, ið hevur ábyrgdina av rakstrinum av øllum skipunum hjá Strandfaraskipum Landsins.

**Starvið**
Skipsinspektørurin stendur fyri umsjónini og eftirlitinum við skipunum hjá Strandfaraskipum Landsins. Tú skalt samskipa, leggja til rættis og fylgja viðlíkahaldi av skipum, skipa fyri umvælingum og seta skip í dokk.

Skipsinspektørurin tekur sær av teknisku ráðgevingini til skipsleiðsluna, og hann skal syrgja fyri, at formligu ásetingarnar, trygdarútgerð og siglingarloyvi eru í lagi.

**Umsøkjarin**
Tú ert útbúgvin markinsverkfrøðingur ella hevur í minsta lagi 3 ára útbúgving sum maskinmeistari, og tú hevur kunnleika til viðlíkahaldsskipanir og royndir við skiparakstri. Vit leggja dent á, at tú hevur fokus á rakstrarútreiðslur, trygd og umhvørvi.

Vit rokna við, at tú dugir at brúka tekstviðgerð, rokniark og dátabasu, og tað er ein fyritreyt, at tú hevur góð evni at orða teg bæði skrivliga og munnliga á føroyskum og enskum. Vit vænta, at tú ert lættur at samstarva við, tolir broytingar og ert vanur at hava nógv um oyruni samstundis.

**Vit bjóða**
Vit kunnu bjóða eitt spennandi og ábyrgdarfult starv, har góður møguleiki er fyri menning. Vit hava eitt gott arbeiðsumhvørvi við samstarvssinnaðum starvsfelagum, og arbeiðsdagurin er mangan fjølbroyttur. Lønar- og setanarviðurskiftini verða skipað sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Setan og umsókn**
Starvið verður sett skjótast gjørligt. Tú fært meira at vita við at seta teg í samband við Regin Vágadal, rakstrarleiðara, tel 34 40 00 ella t-post rev@ssl.fo

Umsókn við próvskjølum verður í seinasta lagi 22. mai at senda til:

Strandfaraskip Landsins
Att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

Ella t-post: pah@ssl.fo

Strandfaraskip Landsins fevna um Oyggjaleiðir og Bygdaleiðir, sum skulu lúka landsins tørv á fólkaflutningi. Fyritøkan skal mest gjørligt rekast á handilsligum grundarlagi. Stórar broytingar eru hendar á Strandfaraskipum Landsins seinnu árini, og víðfevndar menningarætlanir liggja fyri stavn. Millum hesar kann nevnast ein framhaldandi uppstiging og endurnýgging av tænastukervinum á sjógvi og landi.

STRANDFARASKIP LANDSINS

sansir.fo



# Virðisbrævarøktari og greinari til fíggjardeildina

Virksemið í Sparikassasamtakinum er støðugt vaksandi. Ikki minst er vøksturin stórur á íløguøkinum og í tí sambandi hava vit tørv á fleiri starvsfólkum til at ráðgeva kundum okkara.

Føroya Sparikassi er ein nýmótans fyritøka við nógum árum á baki, við virksemi í Føroyum og Danmark. Vit stremba eftir at geva núverandi eins væl og nýggju kundum okkara køna og trygga ráðgeving, ið byggir á veruliga tørv kundans.

Fyri framhaldandi at kunna veita hesa tænastu, søkja vit eftir tveimum starvsfólkum til íløguøkið:

**Virðisbrævarøktari**
At ráðgeva kundum okkara, størri sum smærri, søkja vit eftir einum virðisbrævarøktara, sum er áhugað/ur í at veita kundum okkara skilagóða og fullfíggjaða ráðgeving, sum livir upp til visión okkara um at vera Føroya brúkaravinaligasti peningastovnur.

**Brennir tú fyri at:**

- samskifta við kundar?
- veita eina góða tænastu?
- at seta tær høg mál og røkka teimum?
- geva kundunum eina góða uppliving?
- arbeiða undir avbjóðandi umstøðum?
- flenna og hava tað stuttligt saman við starvsfeløgum?
- læra nýtt?
- fáa fakligar avbjóðingar?

Um so er, hava vit rætta starvið til tín. Faklig útbúgving á økinum er ein fyrimunur, men ikki eitt krav. Harumframt dugir tú sjálvandi at samskifta á føroyskum, donskum og enskum, og kanska eisini á øðrum málum.

**Greinari (analytikari)**
Aðalvirðini í Føroya Sparikassa eru brúkaravinsemi og tryggleiki. Vit vilja fegin vera kend fyri at veita eina fakliga og yrkiskenda ráðgeving, ið tekur støðu í veruliga tørvi kundans. Hetta merkir, at tað, vit lata av hondum, skal hava høga góðsku og virði fyri kundan.

Fyri at veita kundum okkara eina framúr góða ráðgeving, sóknast vit eftir einum greinara, ið skal stuðla okkara kundaráðgevum, so hesir kunnu veita kundunum bestu ráðgeving.

**Brennir tú fyri at:**

- deila vitan tína við onnur?
- veita eina sera góða tænastu?
- fáa fakligar og persónligar avbjóðingar?
- seta tær høg mál og røkka teimum?
- arbeiða við torskildum og avbjóðandi uppgávum?
- veita eina dygdarráðgeving?
- flenna og hava tað stuttligt saman við starvsfeløgum?
- læra nýtt?
- læra frá tær?

Ert tú útbúgvin búskaparfrøðingur ella hevur líknandi útbúgving, dugir at samskifta á føroyskum, donskum og enskum, og kanst svara ja til omanfyri nevndu spurningar, kunnu vit bjóða tær eitt krevjandi, avbjóðandi og spennandi starv. Lesandi, sum eru um at vera liðug við útbúgvingina, eru eisini vælkomin at søkja. Løn verður ásett eftir avtalu og arbeiðsstaðurin er Yviri við Strond.

Áhugaði kunnu hoyra meira um hesi størv við at venda sær til Finn Danberg, fíggjarleiðara, tlf. 348610, teldupost finn.danberg@sparikassin.fo ella Marjuna Eystberg, starvsfólkaleiðari, tlf. 348510, teldupost marjun.eystberg@sparikassin.fo

Umsóknir skulu vera Sparikassanum í hendi í seinasta lagi mikudagin 19. mai 2006 og skulu sendast til:

FØROYA SPARIKASSI
Att.: Marjun Eystberg, starvsfólkaleiðari
Yviri við Strond 2
FO-100 Tórshavn

Visiónin hjá Føroya Sparikassa er at vera brúkaravinaligasti peningastovnur í Føroyum. Í Sparikassanum starvast 211 fólk. Á 16 privatkunda- og 2 vinnukundadeildum kring landið veita vit ráðgeving og selja fíggjarligar tænatur, har aðalvirðini eru tryggleiki og brúkaravinsemi. Á fíggjardeildini starvast 10 fólk. Í samtaki Sparikassans eru tvey dótturfeløg: Húsameklarafelagið Inni og Eik Bank.

FØROYA SPARIKASSI

petur & petur • 320870